

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 11 - 2011

# Ódnarveðrið kann órógva oljuvinnuna

Tað djúpa lágtrýstið, sum gevur ódnarveður á okkara leiðum í kvøld og í nátt, fer eisini at gera um seg í Noregi, og í annaðkvøld kunnu aldutopparnir á Haltenbankanum koma upp í 30 metra hædd, siga norsku veðurfrøðingarnir. Tað ringa veðrið kann fáa ávirkan á oljuvinnuna. Veðurfrøðingurin Rasmus Myklebust sigur við norska kringvarpið, at á Skarvleiðini og á Heidrunleiðini kann aldan koma upp í einar 15 - 16 metrar, og tá kunnu aldutopparnir koma upp í 30 metrar. Í støðum kann sjálv aldan koma upp í einar 16 - 18 metrar, og tá kunnu aldutopparnir vera upp í einar 36 metrar. Hjá Statoil siga tey, at tey halda eygað við gongdini. Hvør pallur hevur reglur, sum siga, hvussu ringt veðrið skal vera, áðrenn framleiðslan verður steðgað, ella um hon skal avmarkast. Tað eru serliga teir flótandi pallarnir, sum verða mest ávirkaðir, tá tað er so ringt í sjónum. Norska veðurstovan hevur boðað frá fullum stormi fríggjadagin úti fyri Trøndelag, men tað ringasta veðrið verður í Norðurnoregi, sigur veðurstovan.